# Kunna um føroyska fiskivinnu á alnetinum

**Heimasíða á enskum um Føroyar sum fiskivinnutjóð og grundarlag okkara fyri burðardyggari gagnnýtslu av havsins tilfeingi.**

KUNNING
*Tíðindaskriv frá Menningarstovuni*

Nú verður farið undir at gera eina heimasíðu á enskum, har kunning um føroyska fiski- og alivinnu, hvalaveiðu og havumhvørvi finst á einum stað.

Heimasíðan, sum fær adressuna www.fishin.fo, er ætlað øllum, ið hava áhuga fyri Føroyum sum fiskivinnutjóð. Alt frá útlendskum fiska- og fiskavørukeyparum, samstarvsfeløgum bæði hjá tí almenna og vinnulívinum, fjølmiðlum og øðrum áhugabólkum.

Harafturat er heimasíðan ætlað at vera amboð hjá føroyskum fiskaútflytarum, sum kunna vísa á, hvussu viðurskifti í Føroyum eru skipað til tess at tryggja vinnuni eitt burðardygt grundarlag.

Tilfarið á heimasíðuni verður fjølbroytt og lagað til kunningartørvin bæði hjá teimum, sum ynskja at fáa eina mynd av fiskivinnutjóðini og hjá teimum, sum hava tørv á at kenna til serlig viðurskifti, t. d. lógir og reglugerðir. Slóðir vera til aðrar viðkomandi heimasíður.

www.fishin.fo er ein felags verkætlan hjá Løgmansskrivstovuni, Fiskimálaráðnum, Vinnuhúsinum, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Menningarstovuni.

Í stýrisbólkinum sita Kate Sanderson fyri Løgmansskrivstovuna, Marita Rasmussen fyri Fiskimálaráðið, Agnar Jensen fyri Vinnuhúsið, Jóhanna Olsen fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Áki Johansen fyri Menningarstovuna.

Annika W. Joensen er sett at savna, skipa og skriva tilfar til heimasíðuna.

Ætlanin er, at www.fishin.fo verður almannakunngjørd 1. mai 2004.

# Kvøldseta á Kambsdali

**Sangur og tónleikur, ferðafrásøgn og hugleiðingar um studentaskúlan, sum nú hevur verið tíggju ár á Kambsdali, eru á skránni í kvøld**

TÍÐINDASKRIV

Í kvøld verður kvøldseta í studetnaskúlanum á Kambsdali. Skúlin skipar vanliga fyri almennum tiltøkum bæði um várið og heystið, og í kvøld klokkan hálvgum átta er talan um almenna kvøldsetu.

Í summar vóru tíggju ár síðani studentaskúlin í Eysturoy flutti í nýggj høli á Kambsdali. Í tí sambandinum fer rektarin, Sámal í Skorini, at hugleiða um søguna hjá skúlanum. Undan flytingini á Kambsdal helt skúlin til við Gøtugjógv. Burðurin var tungur, tá ið skúlin skuldi síggja dagsins ljós, og ikki minst var tað turbolent, tá ið tað varð arbeitt við at fyrireika byggingina av nýggjum skúla. Sámal hevur verið rektari øll árini, síðani fyrstu næmingarnir vórðu tiknir inn á skúlan í 1982, so hann hevur ivaleyst okkurt áhugavert í posanum.

Í heyst var ein 3. flokkur í Egyptalandi. Tey fara í orðum og myndum at lýsa, hvat tey fingu burturúr. Hástigsnæmingar í evnafrøði fara at vísa okkurt eksperiment, og sum altíð so er nógvur sangur og tónleikur á skránni. Tvey hástigs lið, eitt miðstigs lið og fyrsta árs næmingar fara at syngja og spæla.

Kvøldið verður skipað sum kafekvøld. Næmingar skipa fyri sølu av kaffi og køkum. Lagt verður fyri klokkan 19.30 stundisliga. Miðjað verður eftir at kvøldsetan skal vera liðug klokkan 21.30. At kvøldsetan er almenn vil sjálvandi siga, at øll eru hjartaliga væl komin.




*Limir í Føroya Skótaráð og Skótahjálpini saman við Jan á Argjaboða og Doris Hansen*

# Skótar savnaðu 120.000 krónur

**Ein verkætlan fyri skótar í Nepal fær 50.000 krónur, meðan ein bóklingur til heim við brekaðum børnum fær 30.000. Hetta er 20. árið, at skótahjálpin hevur virkað**

SKÓTAHJÁLPIN
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin 16.11.2003 varð peningurin, ið er innkomin við Skótahjálpini í 2003 handaður á fundi hjá Føroya Skótaráð.

Slagorðið hjá skótahjálpini er »skótar hjálpa«, og skal peningagávan fara til at hjálpa børnum.

– Í ár var úrslitið av Skótahjálpini 120.000 kr, og meta vit hetta vera eitt gott úrslit, sigur Annika Højgaard, forkvinna í Skótahjálpini.

Hon sigur víðari, at verkætlaninar, sum tey í ár hava valt at stuðla, eru Skótar í Nepal 50.000 kr. og bóklingurin »Til heim við brekaðum børnum« 30.000 kr.

Nepal er eitt fátækt land í Asia, og umstøðurnar hjá skótunum har eru eins og hjá restini av fólkinum sera vánaligar. Peningurin frá skótahjálpini skal brúkast til at gera eitt hús, har skótarnir kunnu hava sítt virksemi.

Jan á Argjaboða, ið hevur arbeitt í Nepal, er millumlið í hesi verkætlan. Møguliga verður eisini onkur skótaferð gjørd í hesum sambandi, og meta vit hetta vera sera áhugavert.

Í samband við at í ár er »Ár teirra brekaðu«, ætlar stýrisbólkurin fyri »Ár teirra brekaðu« at dagføra bóklingin »Til heim við brekaðum børnum«. Hesin varð prentaður síðst »Ár teirra brekaðu« var. Skótahjálpin stuðlar her við at gjalda fyri prentingina av hesum bóklingi, ið verður latin øllum heimum, ið fáa brekað børn.

Skótahjálpin er afturvendandi tiltak, har skótar frá øllum samskipanum í Føroyum ganga í húsini, og bjóða seg fram at gera arbeiði fyri eina samsýning. Hetta er 20. árið, at allar føroysku skótasamskipaninar hava verið saman um Skótahjálpina, og er nógvur peningur savnaður saman í øll hesi ár, og sendur runt allan heim, at hjálpa børnum, ið hava havt tørv á tí.

Skótahjálpin, ið er tilrættaløgd av eini nevnd, hevur næstan hvørt ár havt tvær verkætlanir, eina útlendska og eina føroyska. Í útlendsku verkætlanini hevur dentur verið algdur á, at tað er onkur føroyingur, ið er knýttur at hesum arbeiði, og soleiðis hava vit havt tætt samband við verkætlanina.

Vit vilja takka øllum, ið hava stuðlað okkum, við at latið skótarnar í Føroyum gjørt eitthvørt, og so givið eina samsýning afturfyri, og á tann hátt gjørt tað møguligt hjá Føroysku Skótunum at vera ein bøtandi hond runt um í heiminum.

# Skatturin lækkar í Klaksvík

**Kommunuskattaprosentið í Klaksvíkar kommunu lækkar við einum hálvum prosenti til 19,5. Samlaðu útreiðslurnar á fíggjarætlanini hjá Klaksvíkar kommunu fyri 2004 er nettur 109,7 mió krónur**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Klaksvíkar Býráð samtykti týskvøldið endaligu fíggjarætlanina fyri 2004, og verða rakstrarútreiðslurnar samanlagt 73,9 mió krónur, meðan ætlaðu íløgurnar verða tilsamans 20,4 mió krónur.

– Rakstrarútreiðslurnar verða tilsamans 94,3 mió krónur, og er hetta ein hækking upp á góð 10% í mun til fíggjarætlanina í ár, har samlaði rakstrar- og íløguavsetingin var 85,1 mió krónur, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Til rentur og avdráttir av lánum v. m. hevur Klaksvíkar Býráð sett av 15,6 mió krónur, sum er ein lækking í mun til í ár, tá 20,4 mió krónur fóru til rentur og niðurrindan av skuld.

Lániskuldin hjá Klaksvíkar Býráð er nú góðar 80 mió krónur, sum svarar til umleið 3/4 av skattaálíkningini.

Samlaðu útreiðslurnar á fíggjarætlanini fyri 2004 er nettur 109,7 mió króur.

Klaksvíkar Býráð roknar við eini inntøku upp á 110 mió krónur, sum svarar til framrokningarnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya, og javnvigar samtykta fíggjarætlanin sostatt við góum 300.000 krónur.

– Býráðið hevur samtykt at kommunuskatturin í Klaksvíkar Kommunu næsta ár verður 19,5%. Hetta er hálvt prosent lægri enn verandi skattaprosent, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, sum heldur, at komandi árini vera nøkur serstøk ár hjáKlaksvíkar Kommunu, nú Norðoyatunnilin verður framdur.

– Har verður stórur tørvur á umfatandi íløguarbeiðum til tess at fyrireia býin at taka ímóti teimum broyttu umstøðunum, sum fasta vegasamabdnið um Leirvíksfjørð fer at hava við sær, sigur borgarstjórin í Klaksvík.



# Svínoyggin vil ikki vera grøn

**SEV og Svínoyar bygdaráð vilja ikki hava nakað við Kára Thomsen og hansara felag at gera og Svínoyar bygdaráð hevur ikki viðmælt eini stórari ES orkuverkætlan í oynni. Kári Thomsen heldur seg hava fingið viðmæli frá kommununi**

GRØN ORKA
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Ivi hevur stungið seg upp um, hvussu grøn Svínoyggin vil vera.

Kári Thomsen og hansara felag Nýorka boðaði í farnu viku frá, at ein størri verkætlan um grøna orku, skudi setast í verk í Svínoy.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, og Pól Sundskarð, borgarstjóri í Svínoy, siga nú, at hvørki SEV ella Svínoyar Kommuna eru við í verkætlanini.

Í fyrsta lagi er ætlanin hjá Kára Thomsen og hansara orkufelag, at fáa tilsøgnir frá kommununi og Orkjurálaráðnum. Hesar tilsóknir skulu brúkast í arbeiðinum, at fáa ES-pengar at fíggja vekætlanina.



*Svínoyar Kommuna vil ikki kennast við orku-verkætlan í oynni*

Verkætlanin er at seta tvær vindmyllur upp í Svínoy og gera eitt sonevnt elektrolysuverk, sum kann framleiða súrevni, sum eitt nú kann brúkast á smoltstøðini. Talan er um sonevnda vetnis-tøkni.

Ætlanin hjá Kára Thomsen er, at verkætlanin skal vera eitt millumtjóðasamstarv. Á hendan hátt slepst eisini framat ES-grunnunum.

Nú er so spurningurin, um svínoyggin vil vera við, og hvønn leiklut SEV skal spæla.

- Bygdaráðið í Svínoy og SEV eru á einum máli um, at verkætlanir sum hendan, verða framdar í tøttum samstarvi partanna millum, verður sagt í tíðindaskrivi frá SEV og bygdaráðnum í Svínoy.

Hinvegin heldur Kári Thomsen, at hann hevur fingið viðmæli frá Svínoyar Kommunu.

- Svínoyar Kommuna hevði gjørt eina samtykt og eisini góðkent, at tíðindini vóru borin alment, heldur Kári Thomsen uppá.

### Ikki álit á Kára Thomsen

Og týðiligt er, at álitið millum SEV og Kára Thomsen er ikki tað besta. Báðir partar skýra hvønn annan at lúgva ella í hvussu so er ikki siga allan sannleikan.

Í tíðindaskrivinum frá SEV og bygdaráðnum í Svínoy sæst rættuliga týðiliga, at tey hava ikki álit á Kára Thomsen og fyritøku hansara Nýorku.

Sagt verður at SEV fylgir væl við fyri at kanna nýggju tøknina og hvussu hon kann gangnýtast, tá hon er tøkniliga og búskaparliga skilagóð at fremja. Og so verður sagt um samstarvsmøguleikar:

- Kanningar verða gjørdar saman við álítandi samstarvspørtum innan- og uttanlands.

Nógv týðiligari kann Kári Thomsen ikki fáa at vita, at SEV ikki æltar at brúka hann og hansara felag.

Tað eydnaðist ikki at fáa orðið á Pól Sundskarð, borgarstjóra í Svínoy, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Grannakommunur hjá Oyndarfirði:

# Vit klára okkum sjálvar



*Elduvíkar Kommuna, sum fevnir um Elduvík og Funningsfjørð, hevur fingið beinleiðis innbjóðing úr Fuglafirði um samanlegging, men Elduvíkar Kommuna er ikki áugað*

**Fuglafjørður hevur boðið Elduvíkar Kommunu at koma upp í kommuna, men har eru ongar ætlanir um samanlegging. Gøta og Leirvík halda fyribils fram, sum einsamallar kommunur**

SAMANLEGGING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Mørkini millum kommunurnar í Eysturoynni broyast í morgin, tá Oyndafjørður hevur valt síðu.

Men grannakommunurnar hjá Oyndafirði: Elduvík, Gøta og Leirvík hava ikki ætlanir um leggja saman við aðrari kommunu.

Fuglafjarða Kommuna er ídnast eftir at finna sær makar. Í Fuglafjarða Kommunu búgva 1591 fólk og kommunan strembar eftir at koma upp á eitt íbúgvatal, sum er omanfyri 2000.

Umframt at biðla til Oyndarfjarða Kommunu, hevur Fuglafjørður bjóðað Elduvíkar Kommunu uppí.

- Vit hava ongar beinleiðis tankar um at leggja saman við aðrari kommunu, sigur Andrias Hammer, sum er borgarstjóri í Elduvíkar Kommunu, sum fevnir um Elduvík og Funningsfjørð.

### Lata standa til

Í Gøtu hava tey heldur ikki viðgjørt kommunusamanlegging.

- Vit koma at liggja millum tvær rættuliga stóran kommunur, men eg kann ikki siga nakað um, hvønn veg vit hella, sigur Haldóra Ranghamar, sum er borgarstjóri í Gøtu Kommunu. Sjálv heldur hon, at øll Eysturoyggin skuldi verið ein kommuna.

Eisini í Leirvík lata tey í fyrsta lagi standa til.

- Vit snakkað yvirhøvur ikki um nakra samanlegging. Vit halda ikki at tað er neyðugt hjá okkum at leggja saman við nøkrm, sigr Sjúrður Eliasen, borgarstjóri í Leirvík.

Felags fyri tær tríggjar kommunurnar er, at tær hava samarbeiði í allar ættir.

Ein partur av Gøtu Kommunu liggur beinleiðis út til Skálafjørðin. Undir Gøtueiði er bygd við egnum postnummari og hoyrir saman við Gøtu.

- Vit hava samstarv við Fuglafjørð, Leirvík og Runavík. Her hendir helst einki fyrr enn vit verða tvungin at leggja saman, heldur Haldóra Ranghamar.